# Útbjóðingarskriv

## Viðvíkjandi húsavørði til Albert Hall

# Húsavarðartænasta

Gjaldstovan bjóðar hervið húsavarðartænastuna í Albert Hall út.

Bygningurin er í trimum hæddum, har hvør hædd er 900 fermetrar.  Tríggir stovnar, t.e. Gjaldstovan, Landsbankin og Hagstovan húsast í bygninginum. Gott hundrað fólk arbeiða í Albert Hall.

Í bygninginum er felags kantina og køkur, har maturin verður gjørdur. Í húsinum er lyfta, ventilatiónsanlegg, stórt oljufýr, no-brake motorur til neyðstreym. Uttanum húsið eru flísar, stórt parkeringsøki og niðanfyri húsið ein stórur bakki við grasi.

## Uppgávan:

Fremsta uppgávan hjá húsavørðinum er at tryggja, at bygningur okkara altíð er innbjóðandi og stuðlar undir bestu karmar til okkara starvsfólk. Hetta merkir, at húsavørðurin skal millum annað:

- rudda og samskipa hald av økinum uttan um
- skipa fyri, at handverkarar gera ábøtur
- verða bindiliður, tá ið stórarbeiði verða gjørd á útsíðum og inni í húsinum
- gera smærri ábøtur á t.d. perur, lás, loftsplátur og smærri málara uppgávur
- koyra burturkast á Brennistøðina
- tøma stubbarør
- hava eftirlit við hita- og luftskipan
- syrgja fyri, at kranar, wc o.tíl. virka sum tey skulu
- seta saman og flyta innbúgv og annað
- hava eftirlit við bili/bilum
- loysa uppgávuna, tá ið lekar eru
- testa motor til neyðstreym og annað í sambandi við motorin einaferð um mánaðin
- gera ymiskt viðlíkahald í køkinum.

Uppgávur verða skrásettar javnan av umsitingini í bygninginum, og arbeitt skal verða eftir hesum listanum.

Uppgávurnar at sláa gras, salta, hava eftirlit við lyft og úthurðum, ansing og at vaska vindeygu verður gjørt av øðrum veitarum, tí skalt tú ikki fremja hesar, men tú skalt hava umsjón við, at hesi viðurskifti eru í lagi.

## Grundleggjandi krøv

Hevur royndir sum húsavørður, og at tú kanst vísa til hesi arbeiði. Tað er sjálvandi ein fyrimunur, um tú:

- hevur viðkomandi handverkligar førleikar, sum t.d. at tú ert timburmaður, elektrikari ella rørsmiður
- hevur góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og dugir væl at samskifta
- dugir at samskifta við okkum á teldu t.d. at føra uppgávulista og samskifti annars
- hevur koyrikort.

## Væntaða tímatalið og arbeiðsstaður

Vit rokna við, at uppgávurnar í miðal taka 16 tímar um vikuna. Vit rokna við, at uppgávurnar vanliga verða avgreiddar 4 tímar um dagin fyrrapart í vanligari arbeiðstíð.

Í teimum førum, at tað krevur nakað eyka, rokna vit við, at tú kanst arbeiða fleiri tímar.

Tú byrjar beinanvegin.

Vit rokna við at kunna ringja til tín, og at tú loysir uppgávuna, um nakað er áfatt uttanfyri arbeiðstíð.

## Krøv til húsavørðin

Húsavørðurin skal vera ein nevndur persónur. Um talan er um fyritøku, ið velur at bjóða, so skulu vit hava navnið á persóninum, sum stendur fyri uppgávuni.

Tú byrjar beinanvegin.

Vit skulu hava 3 ára skjalprógvaðar royndir við uppgávum sum húsavørður.

Og skulu hava upplýst:

- Navn og CV
- Navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku
- Prís pr. tíma uttan mvg
- Frágreiðing um, hvussu omanfyri nevndu krøv verða lokin
- Yvirlit yvir hvørjar kundar viðkomandi hevur
- Frágreið um viðkomandi uppgávur nevndi persónur hevur loyst
- Tilvísing frá kundum seinastu 2 árini.
-

## Meting av tilboðum

Gjaldstovan brúkar fylgjandi vekting:

1. Prísur 50%

2. Góðska/førleikar 50%

    a. Viðkomandi uppgávur 20%

b. Viðkomandi førleikar 30%

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## Hvussu verður vekta

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv, fáa millum 0 - 50 stig fyri prísin.

Tilboðið við lægsta prísinum pr. tíma fær 50 stig. Hini tilboðini fáa stig í mun til lægsta prís pr. tíma.

Um prísurin pr. tíma er lægri enn 250 kr. pr. tíma uttan MVG, verður prísurin settur til 250 kr. í samanberingini við aðrar prísir.

Førleikar eru býttir upp í tilvísingar fyri:

a. viðkomandi uppgávur 20%

b. viðkomandi førleikar 30%

a. Viðkomandi uppgávur

Frágreiðingar um viðkomandi uppgávur verða mettar ein og ein og fáa millum 0 - 20 stig fyri prísin.

20 stig kunnu vera givin fyri tvær "sera" viðkomandi uppgávur, og 0 stig fyri ongar viðkomandi uppgávur. Tað verður mett positivt meira viðkomandi uppgávurnar eru.

b. Viðkomandi førleikar

Út frá upplýsingum um viðkomandi førleikar geva vit millum 0 - 30 stig. Fult stigatal geva vit fyri viðkomandi handverkaraútbúgving, partvís stig verða givið fyri førleikar uttan útbúgving og 0 stig verða givin fyri ongar viðkomandi førleikar. Jú meira viðkomandi førleikin er, jú hægri stigatal fær førleikin.

Samlað meting

Tá ið tilboðið er mett sambært tillutanartreytunum, verður ein samlað meting framd, sum er grundað á stigini, sum eru givin sambært tillutanartreytunum.

Dømi um samanberingar av tilboðum er lýst niðanfyri:

**Tilboð 1:**

Húsavørðurin hevur havt tvær "sera" viðkomandi uppgávur. Hetta gevur 20 stig.

Húsavørðurin hevur eina bókliga útbúgving innan byggifrøði, men ongar royndir. Hetta gevur  15 stig.

Viðkomandi bjóðar ein prís pr. tíma á 500 kr. uttan MVG. Av tí, at 500 kr. er lægsti prísur, gevur hetta fult stigatal: 50 stig.

Stig til samans: 85 stig.

**Tilboð 2:**

Húsavørðurin hevur havt tvær "sera" viðkomandi uppgávur. Hetta gevur 20 stig.

Húsavørðurin er ófaklærdur men hevur verið i starvi, sum minnir um húsavørð. Hetta gevur 15 stig.

Viðkomandi bjóðar ein prís pr. tíma á 600 kr. uttan MVG. Av tí, at prísurin verður settur í mun til lægsta prís, sum er 500, verður stigatalið: 42 stig.

Stig til samans: 74 stig.

**Tilboð 3:**

Húsavørðurin hevur havt tvær "sera" viðkomandi uppgávur. Hetta gevur 20 stig.

Húsavørðurin er útlærdur timburmaður og hevur starvast í timburyrki. Hetta gevur 30 stig.

Viðkomandi bjóðar ein prís pr. tíma á 700 kr. uttan MVG. Av tí, at prísurin verður settur í mun til lægsta prís, sum er 500, er stigatalið: 36 stig.

Stig til samans: 86 stig.

# Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu sendast til **gjaldstovan@gjaldstovan.fo**

Spurningar, ið eru settir fyri fríggjadagin 21. februar 2025, kl. 16.00, verða svaraðir í seinasta lagi týsdagin 25. februar.2025, kl. 16.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og svar kunnu síggjast dulnevnd á keypsportal.fo

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði

Freist **28. februar 2025**.

Tilboð skulu sendast til **gjaldstovan@gjaldstovan.fo**